# Politik

Persónsdátupolitikkur almennur

| | |
|---|---|
| **Ansvarlig** | Jaspur Tausen Gaard |
| **Godkendt af** | Dorit Reinert |
| **Godkendt** | 24.02.2025 |
| **Ændret af** | Jaspur Tausen Gaard |
| **Ændret** | 24.02.2025 |
| **Version / ID** | 4.0.0 / 00602 |
| **Informationstype** | Information – hvis intet indhold |
| **Type** | Politikkur |
| **Publiceret** | 22.05.2025 |
| **Review dato** | 24.02.2025 |

# Persónsdátupolitikkur

Frágreiðingin niðanfyri lýsir, hvussu Gjaldstovan savnar og viðger persónsupplýsingar, og hon vísir á rættindini hjá tí skrásetta í hesum høpi.

Ein persónsupplýsing er ein og hvør upplýsing og meting, ið er knýtt at, ella sum kann knýtast at einum ávísum likamligum persóni.

At *viðgera* persónsupplýsingar er at nýta persónsupplýsingar í einhvørjum høpi.

**Dátuábyrgdari**
Tá Gjaldstovan savnar og viðger persónsupplýsingar, er Gjaldstovan dátuábyrgdari sbrt. ásetingunum í dátuverndarlógini (Løgtingslóg nr. 80 frá 7. juni 2020 um vernd av persónsupplýsingum), og tað áliggur tí stovninum at tryggja, at viðgerðin av persónsupplýsingum er í samsvari við lóggávuna.

**Í hvørjum førum savnar og viðger Gjaldstovan persónsupplýsingar?**
Gjaldstovan savnar og viðger persónsupplýsingar, sum tørvur er á, í sambandi við virksemi hjá stovninum, t.e. í sambandi við ítøkiliga málsviðgerð av t.d. umsóknum um starv, útgjøld/inngjøld o.tíl.

Í flestu førum savnar og viðger Gjaldstovan vanligar samskiftisupplýsingar so sum navn, bústað, telefonnr., teldupostadressu, peningastovnskontu o.tíl. Í ávísum førum verða somuleiðis trúnaðar- og viðkvæmar upplýsingar, eitt nú P-tal og yrkisfelagstilknýti, t.d. í sambandi við lønarsáttmálar og eftirlønarviðurskifti, savnaðar og viðgjørdar.

**Endamálið við viðgerðini av persónsupplýsingum**
Endamálið við viðgerðini er at tryggja eina so haldgóða, rætta og neyva fyrisiting og umsiting av arbeiðsuppgávum hjá Gjaldstovuni sum gjørligt.

**Heimild fyri viðgerðini**
Høvuðslógin í sambandi við viðgerð av persónsupplýsingum er løgtingslóg um vernd av persóns-upplýsingum, eisini kallað dátuverndarlógin. Hon tryggjar rættindini hjá øllum borgarum á økinum, og hesi lóg arbeiðir Gjaldstovan eftir.

Heimildin hjá Gjaldstovuni at viðgera persónsupplýsingar er vanliga at finna í dátuverndarlógini, § 8, stk. 1, nr. 3 og 5, og § 12, stk. 1, nr. 2.

-
**Geva dátur víðari**
Í ávísum førum sendir Gjaldstovan upplýsingar víðari, tá tað er neyðugt til tess at halda skyldurnar í aðrari lóggávu. Tá verða bert tær upplýsingar, ið mettar eru at vera neyðugar í tí ítøkiliga førinum, givnar víðari.

Viðurskifti mótvegis dátuviðgerum hjá stovninum verða í hvørjum einstøkum føri skipað sambært serstakari dátuviðgerðaravtalu millum partarnar.

## Goymsla av persónsupplýsingum og striking av slíkum

Gjaldstovan hevur skyldu at tryggja sær, at persónsupplýsingar verða goymdar trygt og soleiðis, at tað ikki er gjørligt at eyðmerkja tann skrásetta longur enn neyðugt við atliti at endamálinum við viðgerðini.

## Rættindi hjá skrásetta

Dátuverndarlógin tryggjar skrásettum eina røð av rættindum. Hesi eru í kapitli 4 í dátuverndarlógini.

Rættindini í dátuverndarlógini eru hesi:

1. Rætturin til kunning í §§ 23-25
2. Rætturin til innlit í § 26
3. Rætturin til rætting í § 27
4. Rætturin til striking í § 28
5. Rætturin til viðgerðaravmarking í § 29
6. Rætturin til dátuflutning í § 31
7. Rætturin til mótmæli í § 32-34
8. Rætturin til ikki at vera fyri avgerðum, sum eru grundaðar á automatiska viðgerð

Rættindini eru ikki treytaleys, og tað veldst um ítøkiliga málið og ítøkiligu umbønina, hvørt hon kann gangast á møti ella ikki.

Um skrásetti vil gera eitt ella fleiri av hesum rættindum galdandi, skal viðkomandi venda sær til Gjaldstovuna á antin DPO@gjaldstovan.fo ella við brævi til Gjaldstovan, Kvíggjartún 1, 160 Argir.

## Klaga til Dátueftirlitið

Skrásetti kann sambært § 76 í dátuverndarlógini klaga til Dátueftirlitið um viðgerð av persónsupplýsingum, sum viðvíkja honum.

Metir skrásetti, at Gjaldstovan ikki viðger sínar persónupplýsingar í samsvari við reglurnar í dátuverndar-lógini, hevur skrásetti rætt til at klaga til Dátueftirlitið hesum viðvíkjandi. Skrásetti kann klaga um viðgerð, sum viðvíkur honum, við at venda sær til Dátueftirlitið á dat@dat.fo ella á telefon 30 91 00.